Minningarorð

# Símin Højgaard

## *f. 24. juli 1936 d. 26. mars 2006*

*Eg sigla man*
*yvir lívsins hav,*
*meg ber hin*
*skiftandi bylgja*

Símin Højgaard livdi við blóðkrabbameini í seks ár. Sum lívskraftin viknaði, komu hjáárin, ið voldu honum sjúku og pínu. Hann andaðist 69 ára gamal á Landssjúkrahúsinum

Næst yngstur av fýra systkjum vaks hann um í Brekkunum á Toftum. Sum smádrongur baldist hann á sjónum saman við pápanum, beiggjum o.ø.

Tokkin til siglandi skúrur heldur enn spákan á landi førdu til, at hann øll síni virknu ár sigldi sum dekkari, bestimaður og skipari. Sína fyrstu siglingarløn fekk hann sum 12 ára gamal fyri at føra ferðafólk turrskødd av Toftum til Strendur við opnum báti. Soleiðis var tað tá.



Í 1964 búsettis Símin í Runavík við konu síni Hjørdis. Familjulívið myndaðist av fimm børnum, teirra makum og níggju abbabørnum.

Heima lá honum frammaliga at verea virkin. Handalig avrik avgreiddust hegnisliga bæði við huga og sál, men einamest treivst hann í práti við familju, vinum og kenningum. Opin fyri tíðarinnar veruleikum.

Hann var góðsligur maður, sum vísti nærum óendaligt hjartalag og tolsemi. Sum familja kendu vit okkum trygg í nærveru hansara, hvussu lívið so annars leikaði. Í honum sóu vit stúran og stríð ganga hond í hond við vón og gleði.

At enda untist honum ikki at luttaka fult og heilt í lívinum. Hann slapp undan at liggja sjúkur leingi, men livdi seinasta skeiðið í iva og vón um, hvussu nógvir dagar honum vóru tillutaðir. Treyðugt segði hann farvæl við síni kæru.

Símun hevði verið 70 ár tann 24. juli, um lagnan ikki vildi honum tað øðrvísi.

*Góði pápi og maður*

*Hjá okkum kendist óendaliga svárt at missa teg, hóst vit leingi í stillum stúrdu. Tú livdi tínar seinastu seks dgar á intensivu deild í respirator, og vit væntaðu, óttafull og undrandi, at tú enn eina ferð fór at hóra undan; von við at tú ikki legði frá tær.*

*Á 70 ára føðingardegi tínum hátíðarhildu vit dagin við minninum um teg, sum fylgir okkum. Í sakni føla vit takksemi fyri alt, tú hevur verið fyri okkum. Uggan í at tú nú ikki følir sárka og pínum, og at vit einaferð síggjast aftur.*

*Lat akker falla!*
*Eg náddi havn,*
*farvæl, tú ótrygga bylgja!*
*Eg leggi meg*
*í hans kærleiksfavn,*
*sum trúgvur*
*mær vildi fylgja.*
*Hoyr, kendar røddir*
*meg blíðar kalla,*
*nú stilt mítt akker*
*man niður falla*
*í tryggu,*
*sælu hvíldarhavn!*

*Hvíl í fríði*

*Hjørdis og børnini*

# Jona Eidesgaard farin

Mánadagin 17. juli andaðist Jona Eidesgaard, Tvøroyri, á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Hon fór til gravar í dag úr Tvøroyrar kirkju og varð grivin undir liðini á manni sínum, Erlingi Eidesgaard. Jona og Erling vóru foreldur Jóannes Eidesgaard, løgmann.

Jona var fødd 27. juli 1917 og sostatt knappliga 89 ára gomul, nú hon legði árarnar inn. Hon var ættað úr Trongisvági. Foreldrini vóru Jóhanna, sum var ættað av Økrum, og Danial Jacob Magnussen, sum bar kelinavnið Bóndin, hóast hann ongantíð sat við nøkrum festi. Jóhanna og Danial Jacob fingu átta børn, sum vórðu nevnd hjá Bóndanum. Tey vóru Thomasia Holm í Hvalba, Thomas Pauli Magnussen í Trongisvági, Petur Magnussen, sum doyði av tuberklum, tá ið hann var 19 ára gamal, Gerda Magnussen, sum var ógift og búði á Tvøroyri, Jona, Gunnar Magnussen í Trongisvági, Georg Magnsussen í Trongisvági og Hjalgrím Magnussen í Havn.



Nú Jona andaðist, eru øll átta børnini hjá Jóhonnu og Danial Jacobi farin.

Sum ung genta hjálpti Jona til hjá einari mostur, sum var hárfríðkanarkvinna á Tvøroyri.

18. september 1946 giftist Jona Erlingi Eidesgaard úr Oyndarfirði. Hann var hetta sama summarið liðugur at læra til lærara, og tey bæði búsettust á Tvøroyri, har Erling var lærari og frá 1971 varaskúlastjóri. Erling fór úr starvi 1. mars 1987, og hann doyði 21. mai 1987.

Jona og Erling búðu á Tippinum á Tvøroyri, og luturin hjá Jonu var, sum hann var tað hjá flestu føroysku kvinnunum tá í tíðini, at halda hús og at vera kona og mamma. Hon var miðdepulin í heiminum, og inntil tað síðsta fylgdi hon væl við í øllum tí, sum fór fram kring hana og víða um. Ikki minst hvussu tað gekk hjá yngsta soninum í løgmansembætinum. Jona var nøgd við sín leiklut, gekk høgt upp í familjuna, og hon hevði evnini at duga at gleðast saman við øðrum, tá ið tað gekk teimum væl.

Eftir at Erling var deyður, búði Jona í næstan fimtan ár saman við systrini Gerdu, sum andaðist í 2002.

Jona og Erling fingu fýra børn: Martin (1947) er skúlastjóri á Tvøroyri, Magni (1948) er tannlækni í Vági, Jóannes (1951) er løgmaður, og Eyðdis (1958) er skúlastjóri í Eysturskúlanum í Havn. Ommubørnini hjá Jonu eru níggju, og nú hon flutti foldum frá, vóru tíggju langommubørn komin.

**Red.**



## Pápa mínum til minnis Símun Rasmussen

### *f.10/4-33 d. 17/7-05*

Ár er umliðið.
So brádliga og óvæntað,
vart tú ikki meir

Hóast heilsuni bilti
og lívid tyktist torført,
so kendist tað hugstoytt
– á ein hátt órættvíst
at eisini tú vart farin
– so tómt á Heyggi

Tú kendi eisini tómleikan,
sorgina og saknin.
Mamma fylti so nógv
– var so nógv fyri okkum.
At beiggi gjørdist sjúkur
og eisini var tikin frá okkum,
var ikki minni smeiturin.

Tær untist 7 abbabørn
– sást tey vaksa til
– ein barnavinur burturav
– vart nógv um tey.
Nógvir haga- og Tangatúrar,
sum tey minnast við takksemi.
Tókst hond um faðirleysu abbabørnini
og borðreiddi mangan døgurðabitan
– rós fái tú fyri tað.

3 langabbabørn
– so lívsjáttandi.
Tú lívgaðist upp
– Vildi ynskt tú upplivdi tað fjórða og..

Arbeiðslívið gjørdist fjølbroytt
spennandi og mennandi.
Strandingur gjørdist 3. barnið títt
– í samfull 42 ár.
Áhugi og umsorgan
fyri skipi og manning
var undrunarverd.

Babba, eg síggi teg fyri mær
– eftir bygdavegnum
– tínir dagligu túrar.
Hyggi inn á gólvið
– tú leggur kabal
– fæst við at matgera
– ella var tað rokniskapurin.
Kvæða- ella Kingobókin lá har stundum
– ein slíkan tokka tú hevði
til hesa gomlu mentan.
At hoyra tína reinu rødd
var ein fragd fyri oyra
– babba, tú var ein hugnaligur maður
og inniblíður, sum mamma, var tú.

Nú eru tit øll farin
– komi altíð at sakna tykkum
– havi lært at liva við sakninum!

Babba, takk fyri tað, tú vart
og fyri alt, tú lærdi meg

*Dóttir tín*